
Mynd: Shell

# Statoil hevur brúkt fleiri milliardir meir enn ætlað í írskari ætlan

Jógvan Hugo Gardar

22.09.2015 - 17:42

Oljan.fo

19 ár eru farin síðani gass bleiv funnið vestanfyri Írland, men ikki fyrrenn nú byrjar gassframleiðslan her. Hetta er samstundis tann ætlanin har upprunaligi fíggjarkarmurin er víðkaður mest, skrivar Energiwatch.

Sambært blaðnum Irish Independent, so hevur hendan ætlanin kostað Statoil 6,3 milliardir krónur. Bara í 2014 noyddist Statoil at avskriva 1,8 milliardir krónur í Írlandi.

Høvuðsorsøkin til at írska ævintýrið hjá Statoil hevur kostað so nógv er gassøkið Corrib, ið bleiv funnið fyri 19 árum síðani. Fyristøðufelag er Shell, men Statoil eigur 36,5 prosent í loyvinum.

Sambært Shell skal Corrib byrja at framleiða gass í 2015. Útreiðslurnar eru ikki minni enn 400 prosent hægri enn upprunaliga mett, svarandi til knappar 26 milliardir krónur. Stavanger Aftenblad skrivar at hetta er tann ætlanin hjá Statoil sum hevur sprongt fíggjarkarmin mest. Higartil hevur Mongstad-ætlanin veriv tann sum bleiv dýrast, 95 prosent omanfyri upprunaliga ætlava kostnaðin.

Oljulóggávan í Írlandi er sett saman á tann hátt, at 100 prosent av menningarkostnaðinum kunnu trekkjast frá inntøkunum tá eitt øki byrjar at franmleiða gass ella olju. Tað merkir at tað í seinna enda eru írsku skattgjaldararnir sum noyðast at svíða fyri at oljufeløgini ikki koma at gjalda skatt fyrrenn enn útreiðslurnar til menningina av Corrib eru trektar frá.